# Gudloysi

ÁSA JOHANNESEN

Vit hava merkt ein forvæntning til, at vit skulu hava eina meining um Frískúlan Kelduna. Tí hava vit skrivað hetta tíðindaskriv, sum eisini stendur á heimasíðuni hjá okkum:

Í Føroyum er fólkaræði og talufrælsi. Harafturat kunnu vit føroyingar trúgva akkurát tað, okkum lystir... ella kunnu vit tað? Vit kunnu ivaleyst semjast um at vit hava persónligt frælsi í Føroyum, men trúgv fyllir nógv í samfelagnum. Tað munnu vera fá, sum ikki hava hoyrt um Frískúlan Kelduna, kanska serliga orsaka av átrúnaðarliga hallinum hesin skúli hevur.

Gudloysi hevur onga politiska meining vv privatisering av skúlum, men vit raðfesta trúðafrælsi sera høgt. Vit eru ógvuliga fegin um, at tað er eydnast Kelduni at koma í gongd við sínum fríkúla. Frískúlin Keldan fer saman við foreldrum at veita næmingunum eina kristna og siðalagsliga uppaling, og fer ivaleyst royna at kappast við fólkaskúlan á júst hesum øki, fyri at veita eina betri tænastu.

Sambært fólkaskúlalógini er tað krav at allir 1.-9. floks skúlar, privatir, sum almennir, at veita hesa tænastu, so tað er ivasamt júst, hví Keldan følir ein tørv á at leggja dent á júst hetta. Tað virka tey tó at halda, og so leingi fakliga støðið ikki er verri enn tað í fólkaskúlanum (og tað verður tað ivaleyst ikki), so er bara at gleðast um hetta nýggja tilboð.

Vónandi kann hesin kristni fríkúli eisini lætta um átrúnaðarliga trýstið á fólkaskúlan. Fyri at øll børn skulu føla seg líka vælkomin har, átti ein almennur fólkaskúli ikki at verið í parti við nøkrum ávísum átrúnaði. Hetta hevði verið nógv lættari at ført út í lívið, um trúgvandi foreldur høvdu møguleikan at koyra sítt barn í ein skúla, sum styðjaði uppundir júst teirra trúgv. Tí halda vit í Gudloysi, at fríkúlar sum tann hjá Kelduni eru frálíkir.

Vit eru tó eitt sindur forharmað um, at ístaðin fyri at fokusera á kvalitetin av undirvísingini í bæði fólkaskúlanum og fríkúlum, so fer alt kjak um fríkúlar at handla um átrúnað. Í hesum PISA døgum halda vit tað hevur meira at siga at tryggja, at øll børn í Føroyum fáa dygdargóða undirvísing, óansæð hvørjum skúla tey ganga á.

Um tit hava nakrar spurningar, eru tit vælkomin at skriva til okkara.

# Arbeiðs- og familjulívið í javnvág?



BJARNI DJURHOLM
løgtingsmaður

**Spurningar til landsstýrið um betri trivna hjá løntakarunum.**

Føroyski arbeiðsmarknaðurin broytist alsamt, eins og tað gerst alt meira vanligt, at fólk ynskja at liva meira í samljóði við familjulívið og teir møguleikar og avbjóðingar, sum gerandislívið hevur at bjóða. Hetta hevur við sær, at fólk seta fram fleiri krøv til arbeiðsmarknaðin, eins og fólk ynskja møguleika at skipa síni viðurskifti soleiðis, sum tað hóskar teimum best. Hesi ynski, fevna m.a. um ein smidligari arbeiðsmarknað, soleiðis at lættari verður at sameina arbeiðslív og familjulív, seta krøv til allar partar av føroyska arbeiðsmarknaðinum.

Ásannandi, at ávís tiltøk átti at verðið sett í verk til tess at brynja føroyska samfelagið til komandi avbjóðingar á arbeiðsmarknaðinum, setti undiritaði í 2007 eina kommisjón, sum skuldi viðgera hesi viðurskifti.

Kommissiónin skuldi serliga seta fokus á týdningin av javnvág millum arbeiðslív og familjulív, og skuldi hon gera uppskot um, hvussu betri javnvág kundi fáast millum arbeiðs- og familjulív, har endamálið við uppskotunum frá kommissiónini skuldi vera at økja um trivnaðin hjá løntakarunum í arbeiðinum og heima soleiðis, at sínámillum samskiftið millum familjulívið og arbeiðið gjørdist so positivt sum gjørligt.

**Gott familjulív**
Málið var at røkka einum góðum og mennandi familjulívi, soleiðis at arbeiðsmarknaðurin sum úrslit av hesum fekk væl motiveraðar og innovativar løntakarar.

Talan var um umfatandi arbeiði. Kommissiónin var mannað við umboðandi arbeiðsmarknaðin, trúðarlívið og onnur viðkomandi. Formaðurin var fólkalívsfrøðingur og rektari á Fróðskaparsetri Føroya.

Arbeiðið skuldi vera verða liðugt 1. januar 2009. Kommissiónin hevði tveir fundir, men varð arbeiðið lagt stilt aftaná valið í januar 2008, og var kommissiónin avtikin av CHE-samgonguni.

Ætlanin var, at politiski myndugleikin og partarnir á arbeiðsmarknaðinum skuldu fáa eitt idékatalog at skipa framtíðarpolitikkin eftir. Av politiskum orsøkum gjørdist hetta av ongum. Nú tvey ár eru runnin, er arbeiðið framvegis ikki tikið uppaftur, og hevur undirritaði tí sett hesar spurningar til landsstýrismanninum í vinnumálum:

1) Hvønn týdning sær landsstýrismaðurin í smidligari arbeiðmarknaði fyri at betra um møguleikarnar at samskipa arbeiðs- og familjulívið?
2) Heldur landsstýrismaðurin, at við øktum trivnaði á arbeiðsmarknaðinum, at sínámillum samskiftið millum familjulívið og arbeiðið gerst meira positivt?
3) Heldur landsstýrismaðurin, at kommissjónsarbeiðið frá 2007, við sínum greiðu arbeiðssetningum, var eitt skilagott átak?
4) Ætlar landsstýrismaðurin at seta kommissjónsarbeiðið í gongd aftur, so úrslit spyrts burtuúr, sum betur kann sameina arbeiðs- og familjulívið?

# Fólkaatkvøða



ZAKARIAS WANG

Tað er gleðiligt at hoyra at Edmund Joensen er vorðin demokratur. Annað kann síðsta útmeldingin frá oraklinum á Oyrarbakka ikki týða.

Tað hann sigur er, at vit skulu hava fólkaatkvøðu um eina møguliga nýggja vallóg. Eftir øllum at døma heldur hann, at løgtingið so verður bundið av tí svari tað fær frá veljarunum.

Fyri at so skal vera, er neyðugt at løgtingið fyrst tekur tað svar til eftirtektar, sum Føroya fólk gav, tá vit í 1946 av partamonnunum hjá Edmundi vórðu spurd, um vit vildu hava heimastýri ella fullveldi. Tá vóru tað 50,7%, sum vildu hava fullveldi, meðan bert 49,3% vildu hava heimastýri. Hetta var greið tala.

Tíverri hevur tað gingið nakað trekt við at seta fólkins vilja í verk, men nú Edmund er vorðin forsprákari fyri enn einari fólkaatkvøðu, so er ikki at drála við at loysa, fyri síðani at hava fleiri fólkaatkvøður, sum politikar fara at boyggja seg fyri.

Edmund skal tí vera hjartaliga vælkomin í liðið av demokratum í Føroyum!

# Nýggjar inntøkur, sparingar og reformar



EYÐGUNN SAMUELSEN
tingkvinna
Javnaðarflokkurin

Formaður Fólkafloksins leggur, í fjølmiðlunum, alstóran dent á at sparingar og samskipan av ymsum stovnum, í samband við komandi fíggjarlóg. Áhugavert, at hann nevnir sparingar og samskipan innan nærum øll økir, uttan tey, ið hann sjálvur umsitur. Eisini er tað sera áhugavert, at hann metir, at betri umstøður hjá vinnuni fara at syrgja fyri restini. Her nevnir hann, at fiskastovnarnir eru við at koma fyri seg aftur, at vit skulu draga útlendskar íløgur til Føroyar, menna ferðavinnuna og so framvegis.

**Nýggjar inntøkur**
Jørgen Niclasen nevnir ikki eitt orð, um ein tann størsta trupuleikan, ið hetta samfelagi hevur. Ein trupuleika sum Fólkaflokkurin liggur og svevur omaná, nevniliga trupulleikarnir í okkara høvuðsvinnu.

Nærum hvørt mannsbarn í Føroyum ásannar, at neyðugt er við nøkrum grundleggjandi broytingum í fiskivinnuni. Vit mugu tillaga okkara fiskivinnu, so hon aftur verður høvuðsvinnan, í orðsins sanna týdningi. Ein burðardygg vinna, bæði lívfrøðiliga og fíggjarliga. Hesar broytingar, hevur Fólkaflokkurin nú í tvey ár havt høvi til at taka upp til viðgerðar og gera nakað við. Men hvørki orð ei heldur neyðug stig verða tikin.

**Sparingar**
Javnaðarflokkurin vil fegin vera við til sparingar, men tað skal vera á økjum, har játtannir eru í so ríkiligar. Vit kunnu byrja við at hyggja at sjálvum uttanríkisráðnum, og samanbera tað við onnur aðalráð viðvíkjandi játtan, starvsfólkatalið og arbeisuppgávum.

| Ráð | Játtan 2010 | Fulltíðarstørv |
|---|---|---|
| Fíggjarmálaráðið | 8,3 mió | 12,8 |
| Mentamálaráðið | 18,1 mió | 25 |
| Almannamálaráðið | 10,9 mió | 15 |
| Uttanríkisráðið | 23,4 mió | 32,5 |

*Kelda: Fíggjarlógin 2010 hesi tøl vóru lækkað 2% tá ið fíggjarlógin var samtykt.*

Hyggja vit nærri at hesum tølum, so síggja vit, at fíggjarmálaráðið, er tað ráðið, ið er ringast fyri bæði viðvíkjandi játtan og tal av starvsfólkið. Ráðið hevur, síðan 2008, fingið fleiri uppgávur at fyrisita. Kann nevna kommunuøki og eina nýggja játtannarlóg, ið krevur munandi meira av ráðnum enn frammanundan. Hetta er hent, uttan at starvsfólkatalið er økt samsvarandi.

Mentamálaráðið og Almannamálaráðið umsita, saman við Heilsumálaráðnum, ¾ av fíggjarlógini. Haldi ikki at talið av starvsfólkum í hesum ráðum, stendur mát við tær nógvu, og mangan tungu, umsitingarligu uppgávurnar.

Uttanríkisráðið hevur dupult so nógv starvsfólk sum Almannaráðið og tvífalt so stóra játtan. Starvsfólkini á sendistovunum eru ikki tald við. Hendan samanbering talar fyri seg sjálva.

Javnaðarflokkurin vil fegin spara. Vit halda, at Uttanríkisráðið er eitt ráð, har tað hevði borið til at framt sparingar. Hinvegin halda vit, at man átti at uppraðfest Fíggjarmálaráðið, og møguliga okkurt av hinum ráðunum. Páhaldi um, at Javnaðarflokkurin ikki vil spara, har ið tað ber til at spara, heldur ikki.

**Reformar**
Hinvegin siga vit nei til, at halda fram við at klípa nøkur oyrir av her og har, serliga innan almannaøki. Tílíkar sparingar, hevur Fólkaflokkurin rætt í, at vit siga nei til at halda fram við. Vit krevja, at farið verður undir at endurskoða hvørja tí einastu almennu skipan og veiting. Er skipanin tíðarhóskandi, tænir hon sínum endamáli, skal hon inntøkuregulerast í framtíðini. Tílíkar spurningar, og endurskoðanir, vilja vit fegin vera við til at fremja.

Vit ynskja sosialar reformar heldur enn tilvildarligar sparingar. Málið skal verða at varðveita og styrkja tær almennu tænastur, ið vit hava fyri neyðini, á einum rímuligum støði.

Fyri at taka samanum, skal eg einaferð enn staðfesta, at Javnaðarflokkurin vil spara, har ið tað ber til. Vit vilja hava reformar innan almannaøki og fiskivinnuna. Og vit vilja verða við til at økja um inntøkuskapanina í samfelagnum. Við at nýta øll hesi amboð saman leggja vit lunnar undir at framtíðartryggja vælferðina.